**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3268
Navn: Sp/f Miðlon
Adressa: 620 Runavík

Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 14.11.2001
Viðtøkudato: 14.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Sp/f Elding, 100 Tórshavn (Sp/f 2441).
Stjórn: Mads Andrias Winther, Haraldstrøð 14, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 14.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 15. november 2001

Kristin Balle

ELEKTRON

# Teknikari til Tænastudeildina

Vit sóknast eftir einum teknikara til verkstaðið í Tænastudeildini.
Starvið umfatar fjølbroyttar viðlíkahalds- og stuðulsuppgávur í víðøkisnetinum og á staðnum, m.a.:

- Innlegging av stýriskipanum
- Uppseting av teldum
- Røkt av útgerð hjá kundum okkara og hjá Elektron
- Umvæling á IBM-góðkendum verkstaði

**Vit vænta**
at tú hevur hegni til telduarbeiði á tekniskum stigi, at tú setur teg skjótt inn í nýggjar skipanir og útgerð og dámar væl nýggjar avbjóðingar
Vit leggja harumframt dent á, at tú dugir - og at tær dámar - at veita kundavinarliga tænastu á høgum støði.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur eina tekniska útbúgving, t.d. datamekanikari, elektronikk-mekanikari e.l.. Starvsroyndir við telduarbeiði í netumhvørvi er eisini ein fyrimunur.

Tú mást duga bæði at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki. Tú mást sum persónur megna at hava fleiri bóltar í luftini í senn og vera fyrireikaður uppá, at viðhvørt er neyðugt at arbeiða undir ávísum trýsti og uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Vit bjóða**

- Eitt spennandi og avbjóðandi starv við dugnaligum og beinasomum starvsfeløgum.
- Útbúgving eftir tørvi.
- Løn eftir førleika.

**Um tú vil vita meira**
Ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jógvan Olsen, deildarleiðara, á telefon 31 45 05 ella á telduposti jogvano@elektron.fo.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember 2001, og skulu stílast til P/F Elektron, Staravegur 9, 100 Tórshavn.

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum viðurskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri.

**PF ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

stephanssons hús






KPMG

# Starvsfólk
## til skatta- og avgjaldsøkið

Virksemi okkara innan skatta- og avgjaldsøkið er støðugt vaksandi. Vit hava tí brúk fyri einum starvsfólki afturat, sum burturav skal arbeiða við skatta- og avgjaldsspurningum.

***Starvslýsing***
Arbeiðið fevnir um ráðgeving og tænastur innan skatta- og avgjaldsøkið. Innan **skattaøkið** fevna uppgávurnar um ymiskar skattligar spurningar viðvíkjandi

- persónum
- feløgum
- grunnum
- deyðsbúgvum v.m.

bæði sæð í mun til innanhýsis føroyskar skattareglur og í mun til tær tvískattaavtalur, sum Føroyar hava við onnur lond.

Á **avgjaldsøkinum** er serliga talan um viðgerð av ymsum spurningum um meirvirðisgjald.

Tær einstøku uppgávurnar verða vanliga loystar í samarbeiði við grannskoðararnar.

Fleiri av uppgávunum verða loystar í samstarvi við KPMG skrivstovur og aðrar grannskoðarafyritøkur í øðrum londum, serstakliga í Danmark, Íslandi og Noregi.

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv, har rætti umsøkjarin hevur høvi at seta sín dám á starvið.

***Umsøkjarin***
Tann, ið settur verður, skal hava

- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- viðkomandi arbeiðsroyndir
- lætt við at samstarva
- evni at samskifta í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum

Roknað verður við at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

***Umsóknin***
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 15. desember 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

*Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

***KPMG***

Vit eru 25 starvsfólk, herav 2 statsaut. revisorar, 3 cand.merc.aud., fleiri við HD og á veg til HD og cand.merc.aud., og ein við serroyndum innan edv.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f, sum er føroysk ogn burturav, er limur í KPMG International, eitt av heimsins størstu samtøkum av grannskoðarafyritøkum við meira enn 100.000 starvsfólkum til samans.

KPMG veitir tænastur innan grannskoðan, roknskap, fíggjarstýring, skatt og mvg, og aðrar serligar tænastur á hægsta góðskustigi.

Endamálið við KPMG International er, at kundar hjá KPMG í gjøgnum samstarv millum grannskoðarafyritøkur kunnu fáa somu tænastur og somu høgu góðsku um allan heimin. Limaskapur okkara í KPMG ger eisini, at bæði vit og kundar okkara kunnu fáa beinleiðis samband við serdeildir í stórum útlendskum grannskoðarafyritøkum.

KPMG í Føroyum hevur ein góðan og breiðan kundaskara við bæði stórum og smáum kundum innan handil, ídnað, fíggjarstovnar, kommunur og stovnar undir landinum.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team85

# Tøknileiðari til

Sjónvarp Føroya søkir eftir nýggjum tøknileiðara.

Tøknileiðarin hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi, supporti og útbygging av teknisku útgerðini hjá SVF, herundir eisini KT-kervinum. Hann leiðir dagligu tøkni- og KT-serviseringina av bæði umsiting og framleiðslu. Hann er leiðari fyri tøkni- og KT-vørðarnar í húsinum, umframt fólkið, ið sendir. Sjónvarpið er júst farið undir eina umfatandi umlegging av framleiðsluni frá analogari til digitala tøkni, og er tað uppgáva tøknileiðarans at standa fyri teknisku implementeringini av hesi umlegging. Ein ráðgevi er knýttur at digitaliseringsætlanini. Somuleiðis stendur tøknileiðarin fyri útbúgving av starvsfólkunum í nýtslu av nýggjari tøkni.

Sjónvarp Føroya umskipar í løtuni bygnað sín, og verður tøknideildin í hesum sambandi ætlandi partur av nýggjari deild, framleiðsludeildin, ið samskipar og leggur tilrættis alla framleiðslu sjónvarpsins.

**Útbúgving og royndir:**
Hægri útbúgving innan KT- og/ella fjølmiðlatøkni. Drúgvar royndir við arbeiði innan fjølmiðlatøkni. Gott innlit í nýggjastu KT- og fjølmiðlatøknina. Vit vænta okkum harumframt, at tú hevur leiðsluroyndir, og at tú hevur góð samstarvsevni.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið er lønt í lønarbólki 8 og verður sett frá 1. januar 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, tel 340400.

Sjónvarp Føroya

***Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.***

# Frá Vøgguni í Saltangará

**Latið verður uppaftur mánamorgunin kl. 10.00 á Heiðavegi, omanfyri Statoil-støðina.**

**Vit hava hópin av barnaútgerð og barnaklæðum 0-4 ár**

**VØGGAN**
600 Saltangará
Tlf. 449588